Uden

Lagt til rættis: Inna Tørnroos

# HVØR fac TYPA ER

SUMMI SIGA, AT TAÐ ERU 20.000 **FØROYINGAR** Á FACEBOOK, ONNUR ROYNA AT FINNA **200.000** FØROYINGAR HAR. NÓGV ERU VIT Í ØLLUM FØRUM, OG NÓGV ERU **ENDAMÁLINI**, IÐ VIT NÝTA FACEBOOK TIL. HER ERU ÁTTA TYPIR, IÐ VIT Á **VIKUSKIFTINUM** HAVA SÆÐ NÓGV DØMI UM Á FACEBOOK

## PARIÐ

**Eyðkenni**: Tey eiga hvør sína teldu. Arbeiða á skrivstovu ella eru lesandi. Hava yvir 500 Facebook-vinir.

**Á Facebook**: Tey skriva ofta, hvat tey gera - til dømis "Havi gjørt ein lekran døgverða - mums". Hin parturin er skjótur at trýsta á "Dáma". Um onkur av teimum letur Facebook standa opið, fer hin inn og skrivar "Ohhh sum tað er deiligt, at hava heimsins besta mann" ... og so flenna tey í kíki...

Tá tað nærkast songartíð, sendir hon eini kjattboð til hansara og spyr, um tey ikki skjótt skulu fara í song, hann svarar aftur við einum hjarta og einum geispandi smiley.



## FORELDRINI

**Eyðkenni**: Eiga eitt ella tvey børn. Undir 40 ár og dámar væl at taka myndir.

**Á Facebook**: Leggur nýggjar myndir út fleiri ferðir um vikuna. Flestu myndir eru av børnunum og teirra menning. Sum status eru oftani sitat um, hvat børnini hava gjørt og sagt. Til dømis " Í dag segði Emma, 2 ár fyrstu ferð - eg elski teg mamma". Foreldrini hava sjálvandi eisini egna heimasíðu ella bloggu til barnið, og tá nýtt er at frætta har, leggja tey eina leinkju inn á Facebook.

## TÍÐINDAFRÓÐI

**Eyðkenni**: Lesur øll bløð - bæði á netinum og pappírsbløð. Er ítróttarfjeppari og fylgir væl við í samfelagsspurningum.

**Á Facebook**: Merkist mest, tá onkur stór tíðindi eru at frætta. Um tað er ein stórur ítróttardystur er hann skjótari enn allar aðrar heimasíður at siga frá støðuni. Gevur oftani góð tipp til bløðini og onnur, ið eru áhugað ísamfelagsspurningum. Hansara inlegg fáa oftani nógvar viðmerkingar.



## NARCISSISTURIN

**Eyðkenni**: Kann vera bæði kynini, oftast undir 25 ár og stakur.

**Á Facebook**: Skiftir vangamynd fleiri ferðir um vikuna. Hevur forrit á telduni, ið tekur gódar myndir, og tær, ið hann ikki leggur út sum vangamyndir, goymir hann í eini skjáttu, ið eitur "Just me". Nakrar av myndunum eru hálvnaknar og vísa vælvandar vøddar og nýbleiktar tenn.

## NÆRGANGNI

**Eyðkenni**: Her eru allir aldursbólkar umboðaðir. Flestu eru tó kvinnur, ið ikki ræðast at siga ov nógv.

**Á Facebook**: Nógv halda at hendan typan er stuttlig at hava sum vinur, man rodnar eitt sindur tá man lesur og hugsar oftan "Ups, vónandi lesur mamma tín/stjórin/ex-sjeikurin ikki hetta". Nærgangni fortelur alt - kann gott finna uppá at fortelja, hvussu avføringurin var, tá menstratiónin er komin, og hvussu hon er. Dømi uppá, hvat hendan typan kann finna uppá, er at leggja myndir út av føðingini, og tá vísa ALT - uttan sensur.